## FØROYA HANDILSSKÚLI

- skúlin fyri ung og tilkomin

UNDIRVÍSINGARSKRÁ 1976/77

Undirvísingin fæst í hesum deildum

| | Tórshavn | Klaksvík | Fuglafjørður | Tvøroyri | Vágur | Sørvágur | Sandur | Oyrabakki |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Innskriving: | | | | | | | | |
| 4/8 - 10/8 | | | | | | | | |
| 1. Skrivstovulinjan | × | × | × | | | | | |
| 2. Heilsølulinjan | × Tlf. 13374 | × Tlf. 55087 | × Tlf. 44106 | Tlf. 71181 | Tlf. 71181 | Tlf. 209 | | Tlf. 22084 |
| 3. Smásølulinjan | × | | | | | | | |
| Bókhald | × | × | × | × | | × | | × |
| Rokning | × | × | × | | | | × | |
| (Enskt I) | | | | | | | | |
| Enskt II | × | × | × | × | × | × | × | |
| Enskt III | × | × | × | | | | | |
| Týskt II | × | | | | | | | |
| Maskinskriving I | × | × | × | × | × | × | × | × |
| Maskinskriving II | × | × | × | | | | | |
| Matematik | × | | | | | | | |
| Roknskaparlæra (fortreyt: bókhald) (óbroytt frá 1975/76) | × | × | × | | | | | |
| Enskt IV (fortreyt: enskt III) | × | × | × | | | | | |
| Innleiðandi virkisøkonomi | | × | × | | | | | |
| Virkisøkonomi | × | × | × | | | | | |
| Organisatión | | × | | | | | | |
| Starvsfólkaleiðsla | × | | | | | | | |
| Dataviðgerð I | × | | | | | | | |
| Dataviðgerð III | × | | | | | | | |
| Innanhýsis roknskapur | × | | | | | | | |
| Ársroknskapur | × | | | | | | | |

Felags upptøkutreytir:

Í minsta lagi prógv úr 9. flokki, ella skal næmingurin verða fyltur 16 ár ádrenn 1. februar í skúlaárinum.

Handilsmeðhjálparaprógv (2 ár):

Byrjar 23/8 og endar umleið 5/4. Undirvíst verður 4 kvøld um vikuna, 10-14 tímar samanlagt.

1. Skrivstovulinjan

Fyri tey, sum ætla sær í ella hava skrivstovuyrki. Lærugreinir: Bókhald, rokning, enskt II ella III, maskinskriving, vinnulív og samfelag, edv og serligt skeið í skrivstovuteknikki.

2. Heilsølulinjan

Fyri tey, sum hava læruplass í heilsølum. Lærugreinir: Tær somu sum fyri skrivstovunæmingar. Tó verður serstakt yrkisskeið nidri í stadin fyri skrivstovuteknikk.

3. Smásølulinjan

Fyri tey, sum hava læruplass í krambúdum. Lærugreinir: Bókhald, rokning, enskt II ella III, handilslæra, sølulæra, skeltskriving og 1 ella 2 serlig yrkisskeið nidri.

Prógv kann eisini takast í hvørjari lærugrein sær.

Fakroyndir (1 ár):

Fyri tey, sum hava hug at taka prógv í einstøkum ríkisgódkendum lærugreinum. Undirvísingin byrjar 23/8 og endar umleið 5/4. Undirvíst verður 2 kvøld um vikuna fyri hvørja lærugrein.

Lærugreinatilbod:

Bókhald
Rokning
(Enskt I)
Enskt II
Enskt III
Týskt II
Maskinskriving I
Maskinskriving II
Matematik

Hægri fakroyndir (1 ár):

Undirvísingin byrjar 30/8 og endar umleið 20/5. Undirvíst verður 2 x 2 tímar um vikuna.

Roknskaparlæra (fortreyt: bókhald) (óbroytt frá 1975/76)
Enskt IV (fortreyt: enskt III)

Merkonomskeið (1 ár):

Undirvísing á hægri stigi fyri meira tilkomnum, t.v.s. 18 ár og eldri. Undirvísingin byrjar 30/8 og endar umleið 5/5. Undirvíst verður 1 kvøld á 2 tímar um vikuna í hvørjari lærugrein.

Lærugreinatilbod:

Innleiðandi virkisøkonomi
Virkisøkonomi
Organisatión
Starvsfólkaleiðsla
Dataviðgerð I
Dataviðgerð III
Innanhýsis roknskapur
Ársroknskapur

Bankaskúli:

Samrádingar fara fram um slíkan.

Gjøllari verður lýst um ólavssøkuleitid.

Næmingar, sum eru burturstaddir í innskrivingardøgunum, verða bidnir um at senda deildini upplýsingar um: navn, bústad, tlf.nr., fødingardag, fakynski og avrit av loknum prógvum.

Skúlin veitir 15 oyri/km í studningi fyri koyring millum bygdir.

Handilsmeðhjálparanæmingar fáa lærubøkur ókeypis.

Í juli mánað kann ikki roknast við, at leiðsla skúlans er at hitta.

# Fjarðasildin kemur helst sunnanífrá

Hesa seinastu tíðina hava bátar rakt við sild á Skálafjørðinum, í Sundalagnum og á Borðoyavík, og menn bíða spentir eftir, um nógv sild man fara at koma á firðirnar í summar. Á Sørvágsfirði hava teir eisini sæð sild, men enn er onki frætt um, at teir hava fingið nakað.

Jákup Sverri Joensen, fiskifrøðingur, sigur, at teir rokna við, at henda sildin kemur sunnanífrá, helst av Hetlandsleiðini.

Men hann leggur afturat, at hetta bert eru gitingar, og at teir ikki kunnu siga nakað við vissu.

Sildin, sum nú er komin á firðirnar, gýtir um heystið. Hon er full av rognum, og fiskifrøðingar rokna við, at hon fer at gýta einaferð í august-september mánaðai. Hetlandssildin gýtir eisini um heystið.

Í 1969-70 var nógv av fjarðasild á føroysku firðunum, men hesi seinastu árini hevur ikki verið nógv at sæð til hana. Jákup Sverri Joensen sigur, at hetta var várgýtandi sild, og teir rokna við, at hetta hevur verið ein stovnur, sum bert hevur hildið til við Føroyar.



— Vit rokna við, at fjarðasildin kemur sunnanífrá

Har ein kann koma aftur og fáa tekniska vegleiðing og/ella reparatión, um okkurt skuldi verið áfatt. Vit hava special amboð og egið verkstað.

Fa. Maskinverkstaður
v/G. Isfeldt
tlf. 13484
J.C. Svabosgøta 19


**Vikarur søkist til Argja Skúla 18 tímar um vikuna.**

**Umsókn verður at senda til skúlanevndina áðrenn 1. august.**

**Tórshavnar uttanbiggja skúlanevnd**

# Saltfiskaprísir

Prísásetingarnevndin á saltfiski hevur á fundi 16. juli 1976 ásett fylgjandi landingarprísir á ílignum saltfiski.

| | Nr. 1 | Nr. 2 | Nr. 3 |
|---|---|---|---|
| Toskur yvir 22" | 8,74 | 8,56 | 7,87 |
| — 19—22" | 8,23 | 8,05 | 7,41 |
| — 16—19" | 7,08 | 6,90 | 6,37 |
| — 12—16" | 6,16 | 6,07 | 5,54 |
| — 10—12" (hondf.) | 5,47 | 5,38 | 4,92 |
| Upsi | 3,22 | | |
| Brosmi og hýsa | 3,63 | | |
| Longa | 6,30 | | |

Fyri flaktan og saltaðan fisk frá ídnaðarskipum eru omanfyri prísir galdandi við frádrátti av 15%.

Hesir prísir eru galdandi frá og við 1. juli 1976.

Tórshavn, 16. juli 1976

**Prísásetingarnevndin á saltfiski**